# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vaktarskifti á Cuba

Fidel Castro, sum at kalla einsamallur hevur stýrt Cuba í út við fimti ár, boðaði í gjár frá, at hann leggur frá sær. Castro stóð á odda fyri eini sosialistiskari kollveltingarrørslu, sum beindi fyri einum ræðuligum harðræði undir illa gitna einaræðisharranum Batista. Fólkið livdi í neyð og armóð, og meginparturin var analfabetar. Sum vera man tjóðnýtti Castro tær stóru amerikansku og multinationalu fyritøkurnar, ið leingi høvdu gjørt sær dælt av støðuni á Cuba undir Batista. Hartil fóru Castro og flokkur hansara undir eina miðvísa herferð móti analfabestismu og vánaligu heilsuviðurskiftunum, sum eyðkendu hetta tilafturskomna land.

Men Castro fekk við politikki sínum USA ímóti sær. Alt búskaparligt samband millum USA og Cuba varð kvett, og hetta fekk stórar búskaparligar og politiskar fylgjur. USA hevði jú verið størsti samhandilspartnari hjá Cuba, so handilsbannið var ein dyggur smeitur fyri Cuba. Politiskt elvdi handilsbannið til, at Cuba so at siga varð rikið beint í føvningin á Sovjetsaveldinum, sum so gjørdi fremsti samstarvspartur hjá Cuba. Hetta parlag mundi sum kunnugt við Cubakreppuni rent heimin út í ein triðja veraldarbargdaga. Sovjet bant seg til at keypa allan sukurútflutningin og tryggja Castro tey vápn, ið vóru neyðug til tess, at Cuba kundi verja seg móti USA. Verjan var neyðug, tað prógvaði USA sjálvt við at fremja ta illa gitnu innrásina í Grísavíkina á Cuba. Ein stór amerikansk herdeild mest mannað við útlagnum cubanum varð bókstaviliga rikin aftur á sjógv, haðan hon var komin. Tað sigst, at allir amerikanskir forsetar uttan Carter hava ligið Castro eftir lívinum. Kortini er hann, um ikki við sítt fríska lív, so enn á lívi. Hetta merkir ivaleyst, at hann hóast hann er farin frá sum forseti, so kemur hann so ella so at hava ávirkan framyvir.

Hinvegin bendir nógv á, at komandi forsetin Raul Castro, ið sum kunnugt er yngri bróðurin, so smátt fer at seta í verk nakrar broytingar fyrst og fremst av búskaparligum slag. Raul er sera hugtikin av Kina og tí blanding av kommunismu og kapitalismu, sum kinverjar so meistarliga hava sett í verk. Hetta er ein búskaparskipan, sum hevur ført Kina fram í fremstu røð og sum ger, at Kina um fá ár fer at hava sterkasti búskap í heiminum. Eydnast hetta fyri Raul, er vón hjá cubanum um eitt betri tímiligt lív og ein toluligan gerandisdag. Hinvegin er einki, sum bendir á, at Raul og stjórnarflokkurin hava nakrar ætlanir um demokratiskar broytingar. Her er Raul ikki minni samdur við kinversku vinmenninar. Sostatt verða neyvan tær stóru broytingarnar í Cuba í bræði, men sum frá líður er ikki óhugsandi, at politiskar broytingar fara at henda á Cuba.

**Sosialurin**

## Samgonguskjalið 2008

**HERI MOHR**



Í dagar sjey og nætur seks varð alt Føroya fólk hildið í stórum spenningi, tí hvussu mundi hetta fara at enda, skuldu vit fáa eitt nýtt landsstýri, ella fór tað kanska at enda við einum løgtingsvali umaftur?

Loksins varð tað kunngjørt, at 4. februar 2008 skuldu stórtíðindi frættast úr Salinum í Tinganesi.

Tá ið avtornaði, gjørdist dagurin tó so tragikomiskur, at hann valla verður gloymdur í bræði.

Allastaðni varð lurtað: í sjónvarpi og útvarpi á landi og á sjógvi bæði úti og heima. Í Salinum í Tinganesi var hópur av fólki, sum í ótolni trunkaðust um stórt búgvið borð.

Men hvat var á vási, hví hoyrdist einki frá tí politiska kabinettinum?

Fólk fóru at órógvast. Orðið abort lá á tunguni hjá einum. Hann fekk teskað í oyrað, at tað eitur missfall á føroyskum. Men nú varð dúgliga gitt: Onkur tosaði um tongforloysing, ein annar um keisarasnitt, og ein triði ivaðist ikki í hondálegging, tí hann hevði sæð ein lækna fara um hurðina til kabinettið. Ein ónd tunga segði, at teir leitaðu eftir eftirburðinum.

Men so alt í einum kom forloysingin sum ein annar landsynningstømingur.

Løgmaður kunngjørdi fyri Gudi og monnum, at samgonguskjalið var undirskrivað og so statt bindandi veruleiki, men av tí at hetta hevði drigið út – hann hevði drigið hart hoyggj – og skjalið var so langt sum eitt drigið vil, men eingin varð drigin eftir hárinum, helt løgmaður, at tað var nóg mikið, at høvuðsinnihaldið, sum lág í yvirskriftini til manifestið, varð drigið fram: Samhaldsfesti, sjálvstýri, møguleikar og menning.

Nú loysnaði (við ongari loysing).

Fólk vóru glað og klappaðu og sungu. Í Salinum fóru øll til altars. Har var nóg mikið av breyði og víni. Áttamannafar var drigið úr neysti og flotað. Í sjálvgleði fóru tey at klandrast um árarnar. Ein norðingur gjørdist óður, tí hann onga ár fekk. Sum ein annar kamikaze hótti hann við at taka nøgluna úr bátinum og søkka hann.

Í Salinum gekk dansurin so lystiliga. Kvøðið varð við niðurlagnum: "Vit eru føroyingar serstøk tjóð
við felags lagnu og felags blóð."

Mangt er undarligt, tað sigur abbi, ongan veit eg klókari enn hann; soleiðis yrkti Hans Andr. Djurhuus. Um samgonguskjalið hevði abbin, við sínum vanliga góða viti og skili, ætlandi sagt:

Repið seglini, rógvið undir land til betri sjógv og finnið botnin aftur.

Í innganginum til skjalið er tilskilað, at "hvør einstakur hevur mest møguligt frælsi." Hetta samsvarar ikki við frælsið, sum er tryggjað okkum í grundlógini: "Tað persónliga frælsið er
friðhalgað (ukrænkeligt). Eingin kann grundað sína politisku ella religiøsu sannføring ella ætt á nakran hátt verða fyri frælsisskerjing."

Orðingin í hesum annars so drúgva samgonguskjali er ikki merkt av dámligum smædni, men í støðum hómast stórlátni, sum kann minna okkum um skinnfluguna, sum helt seg vera ein elefant. Tá ið hon so lat luftina sum elefantur, hvarv hon við brestin.

## Raðfestir samgongan vælferð ella skerjingar og yvirtøkur?

**MAGNI LAKSÁFOSS**
Løgtingsmaður



**Løgmaður og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fáa í tinginum í dag spurningar, ið varpa ljós á veruligu fíggjarligu raðfestingarnar hjá samgonguni. Spurningurin er, um skerjingar og yvirtøkur koma fram um vælferð**

Á tingfundinum í dag, mikudagin, verða áhugaverdir fyrispurningar settir løgmanni og landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Høvuðsspurningurin er, um samgongan ætlar sær at raðfesta vælferðina hjá føroyingum komandi árini, ella um yvirtøkur og skerjingar í ríkisveitingini verða raðfest framum vælferðina.

Tá samráðingarnar vóru um ABC-samgonguna valdi løgmaður at fara frá samráðingunum við teirri grundgeving, at hann ikki vildi ganga ynskinum á móti hjá Sambandsflokkinum um vælferðargrunn, sum skuldi tryggja vælferðina hjá komandi ættarliðum.

Í staðin fór Javnaðarflokkurin í samgongu við Tjóðveldi, har yvirtøkur og stórar skerjingar í Ríkisveitingini vórðu avtalaðar, meðan einki varð avsett til vælferðina hjá føroyingunum. Hetta varð gjørt, hóast Javnaðarflokkurin undan valinum sendi eitt skriv út í hvørt hús – undirskrivað av Jóannes Eidesgaard – har sagt varð, at ongar skerjingar skuldu henda í Ríkisveitingini, tí hon skuldi nýtast til vælferð í Føroyum.

Á tingfundinum mikudagin verður hesin tráðurin tikin upp, tá undirritaði setur munligar fyrispurningar til Jóannes Eidesgaard, løgmann, og Karsten Hansen, landsstýrismann í fíggjarmálum, um raðfestingarnar hjá samgonguni eru vælferðin hjá føroyingum ella yvirtøkur og skerjingar í veitingum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.